# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# AVLÝSING LØGMANS

Tað var ikki sørt margháttligt at hoyra løgmann á tíðindafundi í Skagen avlýsa og endaliga jarða arbeiðið við stýrisskipanarlógini, sum nú er til viðgerðar í løgtingsins víðkaðu rættarnevnd. Tíðindafundurin varð hildin eftir ríkisfundin millum Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharra, Kupik Kleist, landsstýrisformann í Grønlandi og løgmann.

Málið um stjórnarviðurskifti Føroya hevur fylgt nógv í føroyskum politikki seinastu stórthundrað árini. Flestu av føroysku politisku flokkunum eru stovnaðir sum ein beinleiðis reaktión upp á loysing ella samband - og tí hevur verið torført at skipa og reka politikk við vanliga vinstra-høgra skilnaðinum, sum gjørt verður í øðrum londum. Men í víðkaðu rættarnevndini tykist semja at valda um stjórnarskipanaruppskotið, og tað er áhugavert í sær sjálvum.

Tí tykist tað enn meira margháttligt, at løgmaður beinleiðis avlýsir úrslitið av tí arbeiði, sum rættarnevndin er í ferð við - og boðar frá, at málið dettur burtur og ikki verður lagt framaftur eftir ólavsøku. Tí talan er um eitt mál, sum liggur hjá løgtinginum.

Tað var á løgtingsvalinum í 1998, at vit fingu »systemskifti« í føroyskum politikki, har fullveldisvongurin í løgtingin fekk meirilutan. Hetta landsstýrið hevði fagrar ætlanir um, at Føroyar skuldu loysa frá Danmark við 12 ára skiftistíð at tillaga búskaparligu avleiðingarnar av, at ríkisveitingin sum úrslit av loysingini hvarv. Klimaksið í ætlanini skuldi verða fólkaatkvøðan 26. mai í 2000 - sum kortini ikki kom, tí ósemja var um hana millum fullveldisflokkarnar.

Men at tað nú hevur borið til at gera eitt stjórnarskipanaruppskot, sum allir teir politisku flokkarnir kunnu hava sín ognarlut í, tað er bæði sjáldsamt og áhugavert - og tí er tað spell, um hetta arbeiði fer fyri skeytið, bara tí at løgmaður ikki torir av ótta fyri, at danska stjórnin fer at siga. Tú kunnu vit fáa eina



felags semju um hesi viðurskifti millum allar flokkar á tingi, so hevur føroyskur politikkur flutt seg meira enn hundrað ár fram í tíðina.

Tað kann væl vera, at hetta uppskotið ikki sampakkar við grundlóg og heimastýrislóg, men tað er væl saktans tað, sum er avbjóðingin hjá víðkaðu rættarnevndini at laga uppskotið til, so tað kann samtykkjast uttan at verða í stríð við yvirskipaðar lógir. Í øllum førum skal hetta arbeiði gerast liðugt, nú nógv orka, nógvir pengar og 12 ár eru brúkt upp á arbeiðið.

**Uppskotið kann flyta politikkin 100 ár fram**

# Dagmar samskipari hjá Ferðavinnufelagnum

Ferðavinnufelagið hevur sett Dagmar Joensen í Miðvági sum samskipara – fyribils í seks mánaðir.

Sum liður í menningini av føroyskari ferðavinnu hevur Ferðavinnufelagið sett Dagmar Joensen í starv sum samskipara hjá Ferðavinnufelagnum. Starvið er fyribils í seks mánaðir.

Dagmar hevur drúgvar royndir innan føroyskt vinnulív og hevur seinastu árini búð í London. Har hevur hon m.a. lisið altjóða ferðavinnu og tikið ein MSc í verkætlanarleiðslu. Hon hevur verið virkin í ymiskum verkætlanum á universitetinum og arbeiðir fram til 21. juli á Cumberland School Sports College.

Leingi hevur verið tosað um at menna føroyska ferðavinnu, og ikki minst hevur verið spurt eftir einum meira skipaðum arbeiðið frá teimum privatu vinnurekandi.

Ferðavinnufelagið bleiv stovnað fyri hálvumøðrum ári síðan til tess at fáa skipað arbeiðið betur. Ferðavinnufelagið bleiv limur í Vinnuhúsinum, og felagið er mannað av fimm nevndarlimum sum allir umboða ymiskar ferðavinnugreinir.

Dagmar skal arbeiða við trimum verkætlanum, umframt at taka upp mál sum hava áhuga fyri føroyska ferðavinnu og limirnir í Vinnuhúsinum.

– Dagmar hevur tann rætta profilin, og drúgvu royndir hennara innan føroyskt vinnulív fara avgjørt at koma føroyskari ferðavinnu til góðar. Føroysk ferðavinna og limirnir í Ferðavinnufelagnum hava leingi sóknast eftir einari meira skipaðari tilgongd til átrokandi mál so sum hagtalsyvirlit, kortlegging av øllum ferðavinnuaktørunum og øðrum. Vit eru fegin um at Dagmar hevur tikið av at hjálpa okkum við at menna føroyska ferðavinnu, sigur Jákup Sverri Kass, formaður í Ferðavinnufelagnum.





**Javell hr. statsministari**

BJØRT SAMUELSEN
KJAK Á SÍÐU 14



**Við ella uttan Kaj Leo**

HANS PAULI STRØM
KJAK Á SÍÐU 12

# Stovna netverk fyri stakar uppihaldarar

Leygardagin verður eitt netverk fyri stakar uppihaldarar sett á stovn.

– Seinastu tíðina hevur nógv fokus verið á støðuna og livikorini hjá støkum uppihaldarum í Føroyum. Hetta kjakið hevur prógvað, at tørvur er á einum netverki fyri hendan samfelagsbólk. Ikki minst tí stakir uppihaldarar hava nógv gott at bjóða hvørjum øðrum, bæði praktiskt og sosialt. Tað siga stitakararnir til netverkið.

Tær vóna, at netverkið kann virka á tveimum mótum: politiskt, fyri at bøta um livikorini og bústaðarmøguleikarnar hjá støkum uppihaldarum og børnum teirra í Føroyum, og ítøkiliga, við at netverkið kann savna foreldur og børn til hugnaliga og gagnliga samveru.

Enn er lítið ítøkiligt stungið út í kortið, tí ætlandi skulu luttakararnir sjálvir vera við til at mynda virksemið í netverkinum. Tó er greitt, at endamálið við átakinum ikki er at viðgera viðbrekin politisk mál, so sum lógina um foreldramyndugleika.



Kvinnufelagið í Havn hevur bjóðað netverkinum at húsast í Mettustovu úti á Reyni, tí felagið sær tað sum sína skyldu at vera við til at bøta um korini hjá føroyskum barnafamiljum sum heild.

Fyrireikararnir bjóða øllum – bæði kvinnum og monnum og børnum teirra í Mettustovu leygardagin 19. juni klokkan 14.00, har netverkið verður sett á stovn.

Stigtakarar eru: Barbara S. Berg, sosialráðgevi og cand. ped. soc., Jóanna Djurhuus, løgfrøðingur, Ingrid M. Jacobsen, hondarbeiðslærarinna, og Anna S. Hansen, pedagoglesandi.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*